# PLAYSTATION 3 VERÐUR KANSKA SEINKAÐ

Ætlanin hjá Sony hevur verið at senda nýggju spælimaskinuna Playstation 3 á marknaðin tíðliga í ár. Men hetta kann verða seinkað heilt til várið 2007 skriva fleiri ymiskar alnetmiðlar. Orsøkin til seinkingina er, at nýggja spælimaskinan skal kunna spæla nýggja DVD formatið, Blu-ray Disc, men enn er ikki endaliga avgreitt hvussu Blu-ray disc fer at verða.

PlayStation 3 fer væntandi eins og X-Box og aðrar spælimaskinur at verða seld við undirskotið. Kostnaður at framleiða Playstation 3 verður fyrsta árið yvir 6000 kr fyri hvørja maskinu, men mett verður ikki, at tær kunnu kostað meira enn 3000-4000 kr í handlunum. Tað er tað serliga Cell kippið, ið ger maskinurnar so dýrar. Hetta kipp er sambært Sony ein supertelda pakkað niður í eitt lítið kipp. Leysasøgurnar um seinkingina hava fingið partabrøvini í Sony at fara niður í virði.




*Meðan vit bíða eftir Playstation 3, mugu vit taka til takkar við Playstation 2*

## PARIS BRÚÐUR Í LONDON



*(Mynd: Scanpix)*

Farna vika var mótavika í London, men sambært The Sun, prátaðu øll um Paris, altso Paris Hilton, ið tók øll av bóli, tá hon sýndi klæði fram fyri sniðgevan Julien MacDonald.

Luttøkan hjá Paris var hildin loynilig fyri øllum, og varð ikki avdúkað fyrr enn Hilton arvingurin byrjaði mótaframsýningina á Catwalkinum í einum gráum taft veitslukjóla. Paris sýndi eisini ein lítlan silvur kjóla og ein enn minni gull kjóla og endaði framsýningina sum brúður.

Julien MacDonald segði seg vera avbera væl nøgdan við sýningina hjá Paris, hann var sera gávumildur við jaligu lýsingarorðunum um hana.

## WITHERSPOON LOVAR IKKI AT SYNGJA



*(Mynd: Scanpix)*

Reese Witherspoon, ið hevur vunnið eina SAG,- eina BAFTA- og eina Golden Globe heiðursløn fyri leiklutin sum ein syngjandi June Carter í filminum Walk The Line, lovaði sambært The Star í farnu viku, at hon ikki fór at geva eina fløgu út.

Rættiliga nógvir sjónleikarar hava roynt seg sum sangarar, men hjá næstan ongum hevur hetta eydnast væl. Tað er tí ivaleyst eitt gott hugskot, at Witherspoon heldur seg til sjónleikin. Hon er longu ein av best løntu sjónleikarakvinnunum í Hollywood, og heiðurslønirnar hava ikki gjørt lønina lægri. Oscar handanin er 5. mars og Witherspoon er stórur favorittur at vinna fyri besta kvinnuliga høvuðsleiklutin.

## TANNLEYSUR JAMES BOND




*(Mynd: Scanpix)*

Undir upptøkunum til nýggja James Bond filmin Casino Royal gongur hart fyri seg. Daniel Craig, ið er nýggi maðurin handan tølini 007, er ikki bangin fyri sjálvur at taka sær av bardøgunum í filminum. Men hetta gekk heldur illa undir upptøkunum í Prag. Í einum bardaga fekk Craig eitt slag í munnin, soleiðis at blóðið stóð úr munninum og tenn brotnaðu, skrivar bt.dk. Tannlækni varð boðsendur úr London, at gera honum krúnur á brotnaðu tennirnar. Keldan hjá blaðnum sigur, at Craig nú brúkar tannverju, tá hann berjist.

